# Føroyskur útflutningur neyvan raktur av muslimskum boykotti

**Vit fara neyvan at kenna nakran búskaprligan sviða av, at muslimsk í hesum døgum boykotta danskar vørur. Hinvegin eiga vit ikki at gloyma, at góðtaka vit vantandi talufrælsi aðrastaðni, kann hetta eisini raka okkum sjálv, verður m.a. sagt av fimm føroyingum, ið hava eina meining um ta spentu støðuna millum Danmark og muslimsku atfinnararnar**

*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Danmark hevur rættiliga verið í altjóða andgletti seinastu tíðina, eftir at Jyllands-Posten í heyst prentaði satiriskar tekningar av profetinum Muhammed. Í blaðnum í gjár høvdu vit samrøðu við føroyska teknaran Óla P, sum helt at vit áttu at gera alt fyri at standa saman um okkara frælsi at tala, skriva og tekna. Somuleiðis prátaðu vit við Jóannes Kjølbro, sum starvast hjá Maersk í Katar, og hann ætlaði sær niður aftur hagar, um hann ikki fær onnur boð frá arbeiðsgevaranum.

Men kann ágangurin ágangurin á Danmark úr muslimskum londum eisini raka Føroyar, sum jú er partur av danska ríkinum? Hendan spurningin og hvørja støðu vit skulu hava til hetta málið settu vit løgmanni og persónum úr føroyskum vinnu- og andlívi.

## Neyvan avleiðingar fyri føroyska vinnu



Jan Mortensen væntar ikki, at føroysk vinna fer at kenna sviðan av boykotti av donskum vørum. Hann minnir tó, at vit liva í eini globalari bygd, har onnur fylgja við í, hvat fyriferst

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum, óttast ikki fyri avleiðingum av støðuni hjá Danmark mótvegis muslimsku atfinningunum, hóast hetta hevur fingið avleiðingar fyri danskan útflutning, og vit eru ein partur av Danmark.

– Eg rokni ikki við, at hatta fer at ávirka, tí vit hava lítlan útflutning til beinleiðis muslimsk lond, sigur Jan Mortensen. Hann metir tó hetta vera eitt dømi um, at hetta eigur at fáa okkum at hugsa okkum um, tí vit liva í tí sokallaðu globalu bygdini, har tað sum verður kjakast um hjá okkum, eisini kann frættast aðrastaðni.

Spurdur, um talufrælsi mótvegis inntøkum frá útflutningi er eitt dilemma ella tvístøða hjá okkum, sigur stjórin í Vinnuhúsinum, at sjálvandi skulu vit varðveita okkara talufrælsi, og tað síggja vit eisini í føroyskum blaðkjaki, har ein og hvør kann siga, hvat hann vil. Í flestu førum verður hetta bara eitt føroyskt kjak, sum ikki fær týdning aðrastaðni, men Jan Mortensen nevnir tó grindadráp sum eitt dømi, har tey kritisku eyguni hjá útheiminum vórðu vend móti Føroyum.

### Ongar føroyskar merkisvørur

Jan Mortensen nevnir danskar merkisvørur, sum t.d. Lego og Arla, ið ofta verða knýttar at Danmark. Føroyingar hava hinvegin sum so ikki nakrar merkisvørur, men eru ofta undirleverandørar av fiski, og tí er vandin ikki so stórur fyri, at beinleiðis boykot raka Føroyar, eins og vit síggja tað av donskum vørum í dag. Føroyskur fiskur endar nevniliga ofta í einum pakka, har Føroyar standa við smáum stavum, og kann hetta innibera bæði fyrimunir og vansar.

- Men í slíkum førum eru vit ofta heldur ósjónlig, og tí er vandin fyri boykotti ikki stórur, sigur Jan Mortensen.

## Skal bera til at kjakast um átrúnað

Góðtaka vit, at onnur ikki skulu kjakast um átrúnað, kann tað sama henda hjá okkum, og so kunnu fólk siga hvat tey vilja, bara tí tey hava ta røttu trúnna, sigur Rói Patursson



Er støðan, sum nú hevur tikið seg upp millum Danmark og muslimsk lond nakað nýtt, sum vit skulu byrja at venja okkum við, nú vit eru komin inn í 21. øld og alheimsgerðin er ein veruleiki?

Hendan spurningin settu vit Róa Patursson, háskúlastjóra og heimspekingi, og gav hann gav okkum rætt í, at hetta er ein rættiliga umfatandi spurningur at svara í stuttum blaðviðtali.

Men Rói patursson, metir tó, at sum so er ikki nakað nýtt í hesum kjakinum, tí tað gongur langt aftur í tíðina, at kjakast um viðurskiftini millum átrúnað og verðsligt vald.

Men tað, sum er nýtt í hesum málinum sambært háskúlastjóranum, er, at her er talan um tvær ymiskar mentanir, sum skoða viðurskiftini á hvør sín hátt í einum globaliseraðum heimi.

– Vit mugu ansa øgiliga væl eftir, at vit ikki glíða í hesum málinum, sigur Rói Patursson, tá spurningurin um talufrælsið verður umrøddur. Hann metir, at støðan ikki bara skal fatast sum ein neilig støða

– Hetta kann verða byrjanin til eina globala diskussión, sum kann vera til okkara favør, tí vit hava nøkur ótrúliga góð argument, sigur Rói Patursson. Hann minnir á, at tað finnast nógvir røddir í tí islamsku mentanini, sum tala fyri at býta valdið millum stat og átrúnað, og ávarar tí staðiliga ímóti bara at síggja hetta sum eitt stríð millum "okkum og tey".

Rói Patursson sigur seg ikki kunna taka undir við tí argumentinum hjá ávísum muslimskum politikarum, sum siga, at talufrælsið eru innanhýsis donsk viðurskifti, tí talan er eisini um eit kjak um fólkaræði, og tí hava vit ikki bara góð argumentir, men eisini áhugamál í hesum spurninginum.

– Ein og hvør átrúnaður má kunna diskuterast, tí hevur man eina sannføring, má man kunna kjakast um hana. Tí góðtekur man ta støðu, at man ikki kann diskutera átrúnað, kann tað sama henda hjá okkum, og so kann fólk kritikkleyst og ábyrgdarleyst siga hvat tey vilja, bara tí tey hava ta røttu trúnna, sigur Rói Patursson.

## Stjórnin átti at meldað út tíðliga

**Løgmaður sigur, at Landsstýrið ikki hevur viðgjørt støðuna, sum Danmark er komið í, men sjálvur metir hann, at stjórnin kundi verið kvikari í vendingini**



Jóannes Eidesgaard, løgmaður, umsitur uttanríkismál í Landsstýrinum. Hann sigur, at Landsstýrið hevur ikki viðgjørt støðuna innanhýsis, sum Danmark er komið í mótvegis tí muslimska heiminum, men sjálvur heldur hann tað vera týdningarmikið ikki at gera hetta til eitt føroyskan trupulleika. Hann sigur seg tó vóna, at Danmark klárar at loysa hetta.

– Eg harmist um avleiðingarnar hetta hevur fingið fyri danskan útflutning, men eg vænti ikki, at hetta kemur at raka føroyskan útflutning, sigur Jóannes Eidesgaard.

– Persónliga haldi eg, at vit altíð eiga at virða virðir og sjónarmið hjá hvørjum øðrum, eisini um tú ikki skilir tey, og tí er tað ein óheppin støða, Danmark er komið í, har man setir pressufrælsið so høgt, at onnur áhugamál verða skadd, sigur løgmaður, ið heldur, at danska stjórnin tí drálaði ov leingi, og at hon tí beinanvegin átti at meldað út, at hóast hetta vóru sjónarmiðini hjá Jyllands-Posten, so vóru hetta ikki sjónarmiðini hjá donsku stjórnini.

## Ikki brúka Dannebrog

**Árni Olafsson úr danska uttanríksmálaráðnum væntar ikki, at føroyingar fara at merkja nakað til rumblið um muhammed-tekningarnar**



Àrni Olafsson starvast í danska uttanríkismálaráðnum í Keypmannahavn og er serkønur í føroyskum viðurskiftum. Hann metir ikki, at muhammed-tekningarnar í Jyllands-Posten fara at verða nakar ítøkiligur trupulleiki fyri Føroyar.

Hann vísir á, at so at siga einki av føroyskum útflutningi fer til muslimsk lond. Tó kann nakað av tí føroyska fiskinum t.d. laksur, sum fer viðgjørdur úr øðrum londum, fara víðari til muslimsk lond.

– Føroyar eru í summum samanhangum roknaðar sum partur av Danmark, men í handilsstatistikki eru Føroyar fyri seg, sigur Árni Olafsson, ið tó minnir á, at hagtøl ikki altíð eru álítandi.

Tað er danska uttanríksmálaráðið, ið plagar at vísa á, um ávís øki í heiminum kunnu vera vandamikil at ferðast í hjá donskum ríkisborgarum, men hann dugir ikki at siga beinleiðis, um stemningurin í uttanríkismálaráðnum er spentari í hesum døgum enn vant. Hann nevnir tó, at fólk eru ávarað um ikki at hava Dannebrog á eitt nú ryggsekkum, um tey ferðast í muslimskum londum. - Men tað vænti eg heldur ikki, at nógvir føroyingar hava, leggur hann afturat.

## Muslimar í Europa kunnu byrja at boykotta

**Á Farex eru tey ikki bangin fyri, at sølan av føroyskum fiski fer at minka, men vænta, at diplomatiið fer at sigra**



Rói Egholm, stjóri á fiskasøluni Farex, sigur seg ikki óttast, at føroyskur fiskaútflutningur fer at verða raktur av trupulleikunum, sum danskur útflutningur hevur rent seg í.

Hann sigur seg vænta og vóna, at danir fara at klára at loysa hetta stríðið við diplomatii, men um hetta ikki eydnast, so er vandi fyri, at føroyskur fiskaútflutningur kann merkja hetta, um muslimskir keyparar í eitt nú London ella Paris ikki vilja keypa fisk frá okkum.

Rói Egholm leggur dent á, at alt hetta bara eru gitingar frá hansara síðu um, hvat hendir, um Danmark ikki megnar at loysa knútin.

Men hann metir tað altíð vera óhep pið, tá fokus verður sett á nakað annað, enn tað vit eru góð til, nevniliga at selja fisk, og tí heldur hann tað vera primitivt, tá slík tiltøk verða sett í verk.

### Fá kenna Føroyar

Hann sigur tað vera trupult at ímynda sær, at slík argumentatión, sum vit síggja í løtuni, skal vera brúkt í 2006, men hann metir tað avgjørt vera relevant hjá føroyingum at seta okkum spurningin, um avleiðingarnar, sum danskt vinnulív merkir í løtuni, eisini kann raka okkum. Hann leggur tó afturat, at hóast føroyskur fiskur er væl kendur í eitt nú Spaniu, so heldur hann at føroyingar gera ov lítið við at marknaðarføra okkum, og tí er tað neyvan altíð, at brúkarin í seinasta enda kennir Føroyar, har fiskurin er fiskaður, Rói Egholm metir, at fleiri milliónir av italienarum mundu hoyra um Føroyar fyri fyrstu ferð í seinastu viku, tá vit komu í sama bólk sum Italia til EM-undanumafrið í fótbólti. Farex eigur eitt dótturfelag í Danmark, sum fiskur úr Føroyum verður seldur ígjøgnum. Hetta minkar um fakturaútreiðslur, tá flytast skal inn í ES, og tí er tað ikki altíð so sjónligt á pakkunum, at fiskurin úr Føroyum.